# BØNARLØTAN

Mars 2017 32. árg.

**1. Mikudagur** **1. Mós. 28.1-22**



*Seria saman við dóttur.*



## GRØNLAND, Qaqortoq
## Marjun og Páll Poulsen

Seria, einlig mamma við fýra børnum, hjálpti við tulking allar legurnar í fjør. Abbin varð ávirkaður av herrnhuttunum og lærdi abbadóttrina Seriu. Sum hon hoyrdi Guds Orð á legunum, kom hetta fram fyri hana sum ein staðfesting, og hon upplivdi eina endurnýgging. Hon hevur álvarsligar hjartatrupulleikar, hevur fleiri ferðir verið innløgd á sjúkrahús og noyðst at havt tey minstu børnini hjá sær. Hon vil tulka aftur í summar.

Rætting: Í seinastu Bønarløtu skrivaðu vit, at 8 fólk høvdu teknað seg at hjálpa til. Tað rætta er: at arbeiða, gera elverk o.a.

## KRINGVARPIÐ

12. mars Sjónvarpsandakt, Jákup Hansen
18. mars Sjónvarpsandakt, Jákup Hansen
26. mars Sjónvarpsmøti, Siloa, Fuglafjørður

**R7** (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møtir í Jútlandi

4. mars kl. 19 í Betaniakirkjuni,
Dag Hammarskjøldsgade 2A í Aalborg.
11. mars kl. 19 í Esbjerg, Ådalsparken 33
12. mars kl. 17 í Vejle, Frelsunarherhølið, Staldgårdsgade 4

## *2. Hósdagur* — *Sálmur 70 og 71*

### USA, Nebraska, New Tribes Mission
### Rachel og Peter Hansen, Steffan 17, Caleb 14

Fyrst í mars luttaki eg á trygdarfundum, har meira enn 40 trúboðanarfelagskapir tosa saman um, hvussu vit best hjálpa trúboðarum, sum virka, har trydgarviðurskiftini ikki eru sum heima. Seinni í mánaðinum fari eg á fund við NTM flognevndina. Í dag hevur NTM flogfør í fýra londum.

### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen, Kano 7, Nana 5 og Louie 3

Biðið fyri fyrireikingini at fara til Japan at virka sum trúboðarar. Serliga at børnini klára alla broytingina og falla væl til

### DANMARK, Brejning
### Jan og Anne Zachariassen

## *3. Fríggjadagur* — *2. Tess. 2.1-17*



### DANMARK
### Keypmannahavn, Kristnastova
### Dora og Niels Pauli Nónstein, Sigrid 9, Andreas 7, Kristina 5

4. mars undirvísir Niels Pauli í 3. Mósebók á bíbliuskeiði í Kristnastovu. 29. mars undirvísir hann um evnið „Jesu mission" á Perspektiv Bibelskole, sum samkomur í Keypmannahavn og Odense standa saman um.



### DANMARK, Hirtshals, Malta
### Anna og Hans Djurhuus

18. mars verður kvinnudagur á Malta. Tripletrioin í Ebenezer syngur og vitjar kvinnurnar. Páskalega verður 12. apr. til páskadag 16. apr. í Balle Musik- og Idrætsefterskole, Ballevej 57, 7182 Bredsten. Sonni Poulsen hevur bíbliutímarnar fyri teimum vaksnu og Jákup Hansen úr Klaksvík fyri teimum ungu. Øll eru hjartaliga vælkomin; talað verður á donskum. Tilmeldingarfreistin er 1. apr. á: maltalejr@gmail.com ella hjá Edmund Joensen, tel. +45 40192451 ella +45 98943775.

## *4. Leygardagur* — *1. Mós. 29.1-19*

### FILIPSOYGGJAR, NTM
### Liz og Ragnar Niclasen

Vit eru takksom, tí nú prenta vit fyrstu bók við kankanaey tilfari, sum vit í hálvtannað ár hava skrivað saman við dugnaligum kankanaey trúgvandi. Bókin er ætlað til evangelisering, sum tey trúgvandi gleða seg til. Henda mánaðin fara Pablito, Rogancio og eg út í fýra økir í kankanaey fjøllunum at læra tey trúgvandi at brúka tilfarið. Síðan skriva vit næstu bókina.

## *5. Sunnudagur* *2. Tess. 3.1-18*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit verða her í Fjareystri til 29. mars. Tørvur er á at broyta bygnaðin hjá NTM og NTM skrásetingina hjá myndugleikunum. Hetta er rættiliga fløkt, men má gerast. Eg skal luttaka, tá NTM-leiðslan her hevur fundir við myndugleikarnar og ráðgevarar um hetta.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**– Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Mánadagur* *1. Mós. 29.20-35*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Vit byrjaðu bíbliutímar aftur í febr. Nógv komu at hyggja eftir Jesusfilminum og eftir filminum um Ápostlasøguna. Vón okkara er, at fleiri eisini halda á at koma, nú Erik undirvísir. Badiaranke-skúlin er eisini byrjaður aftur, har tey læra at lesa og skriva sítt móðurmál. Eg haldi á at umseta Bíbliuna. NTM-leiðslan og senegalesiskir pastorar vitja um hálvan mars. Teir vilja síggja arbeiðið fyri at skilja, hvat vit gera, og hvat krevst at vera trúboðari á fjarskotnum støðum.

**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 13, James 10, Micha David 7**

## *7. Týsdagur* *Filemon 1-25*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**
**Jonathan Daniel 16, Ísak 14**

24. febr. - 4. apríl vitji eg samkomuna í Papua Ný Guinea og undirvísi. Samstundis haldi eg á at umseta Bíbliuna.



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 12, Aron 5, Noah Kristian 3**

Enn er nógv at fyrireika, áðrenn vit kunnu fara aftur til Teilands í summar. Eg vitji samkomur og einstaklingar í Føroyum 25. mars - 6. apr. Avtalið vitjan við Sørin á sorinjoensen@gmail.com ella hjá Øssuri Andreasen á tel. 218818.

## *8. Mikudagur* *1. Mós. 30-1-24*



**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Hannah 17, Eva 16,**
**Miriam Joy 13, Noah 10**

Sara er sett eiga 15. mars. Eitt Logos Hope toymi kemur til Danmarkar i mars og apríl at vitja samkomur, ungdómsbólkar og kristnar eftirskúlar. Biðið, at tiltøkini eggja ungum at luttaka í trúboðan.



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

⋆ Í dag fyllir Jonathan Daniel Joensen 17 ár.

## 9. Hósdagur — Sálmur 72

### FØROYAR
**Shamila og Høgni Johannesen, Joy 14, Adonia 8**
Fleiri møtir liggja fyri framman. Trúarverjan krevur nógv, men hevur eisini nógva og góða ávirkan. Mær tørvar meiri orku at lesa og fyrireika tilfarið.

## 10. Fríggjadagur — Ápost. 7.41-60

### DANMARK
**Glostrup Frikirke**
Perspektiv Bibelskole bjóðar bíbliulestrarætlan og bíbliulestrartilfar á alnótini. Harumframt verður skipað fyri trimum skeiðum hvørt ár. Ábyrgdina hava samkomurnar Skovlunde Frikirke, Glostrup Frikirke, Kristnastova, Kristent Fællesskab Odense og Kristent Fællesskab København. Les meira á: www.kristentf.dk/indhold/perspektiv-bibelskole

### ONGLAND, Birmingham, OM
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 11, Rebekah 9, Lydia 6**



Eg og fleiri trúgvandi ætla at gera eina app til kurdisku Bíbliuna. Nógvir kurdar eru spentir, tí fleiri teirra gjørdust trúgvandi júst av at lesa Skriftirnar.

### ONGLAND, Cornwall
**Anna og David Rodda**



### ONGLAND, NTM North Cotes
**Julie og Sonni Poulsen**

## *11. Leygardagur* *Josva 10.28-43*

**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**
Í vetur er motorurin høvuðsumvældur. Vit hava verið royndartúr, og alt riggaði. Nú er skipið á beding til umvælingar, 1. juni verður farið til Grønlands á 10. ári.

## *12. Sunnudagur* *Ápost. 8.1-17*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Vit vóna at kunna keypa ein 48 fót bát í Nýfundlandi. Prísurin verður uml. 48.000 dollarar. Ætlanin er at sigla bátin til Grønlands. Okkum tørvar Harrans leiðslu til fígging av bátinum og trygga ferð.

## *13. Mánadagur* *Josva 11.1-23*

**FØROYAR**
**Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
Vit gleðast um, at Arnvør er farin í venjing fyri minnið. Hon skal møta fýra dagar um vikuna kl. 9 - 14 í tveir mánaðir. Í Zarepta verður arbeitt í kjallarahæddini í Niðarulon. Høllin verður sparslað og málað. Arbeitt verður eisini í teimum smærru rúmunum uppá vatn og el. Arbeiðið uppá ventilatiónina er liðugt. Bodil og Levi fingu eina dóttur 24. nov., sum fekk navnið Sára Lív.
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 9, Svend 8, Terji 4, Petra 3**

## *14. Týsdagur* *Ápost 8.18-40*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**

25. juni til 22. juli hava vit 2 barna-, 1 ungdóms- og 1 familjulegu í Nalersitaq við uml. 35 børnum á hvørjari býtt upp í 5 lið. Victoria, tel. 272376, og Karsten Neshamar, tel. 259481, eru nýggj kontaktfólk. Vit hava brúk fyri, at fleiri hjálpa okkum. Økið er vælegnað hjá barnafamiljum. 6. juni kemur Thorvald Gaardlykke við fýra fólkum úr Danmark at gera arbeiðið upp á vatnturbinuna liðugt, umvæla dieselmotorarnar o.a. Tørvur er á fleiri til hetta arbeiðið. Upplýsing hjá Thorvald, tel. 231286.
★ Í dag fyllir Kristina Nónstein 6 ár.

## *15. Mikudagur* *Josva 12.1-24*



**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech, Jan 14**

Maria hevur umsett Emmaus bíbliuskeiðið Gyltir Lyklar. Rættlestur og uppseting verður nú gjørd. Tað hevði glett okkum, um skeiðið varð prentað í vár. Jens vitjar, hevur bíbliutímar og fyrireikar summarlegurnar á Zarepta.

**– Elin og Jógvan Jacobsen, Agnas 14, Boas 9**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**



**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 6, Leah Eve 3**

## 16. Hósdagur — Sálmur 73



**FØROYAR**
**Rutt og John í Skemmuni**
Vit taka lut á møtum og andaktum her suðuri og vitja eisini fólk heima. Ætlanin er at halda á at vitja samkomur saman við Poul Færø. Suðuroyarlega verður vikuskiftið 24. - 26. mars. Rutt stríðist við giktasjúku; vit eru takksom fyri forbøn.
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Lis og Zacharias Zachariassen**
★ Í dag fyllir Evita Linda Tuohy 2 ár.

## 17. Fríggjadagur — Ápost. 9.1-22



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 15**
Ráðstevnan í Kuala Lumpur gekk væl. Ivor ferðast nú at kunna um avbjóðingarnar í Russlandi og aðrastaðni í Asia. Biðið, at Harrin kallar trúgvandi at bera teimum ónáddu boðskapin, serliga í Russlandi. Sonja ger nú skúlan lidnan her og flytur síðan til Írlands at útbúgva seg.

**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 3, Micah 3**



**LANDSYNNINGSASIA**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 15, Jonathan 14,**
**Leslie 14, Emily 6, Bethany 2**

## *18. Leygardagur* *Josva 13.1-14*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 14, Megan 12, Trisha 4, Emma 0**

Trupult er at fáa føroyskt innfararloyvi til Megan og Trishu. Tær vórðu ættleiddar fyrst í 2015, men hava enn ikki loyvi at koma heim til Føroya at vitja familjuna. Síðsta, vit hoyrdu úr Danmark, var, at loyvini ikki fáast fyrr enn einaferð í 2018.

## *19. Sunnudagur* *Ápost. 9.23-43*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Støðan í landinum er enn spent. Haldið á at biðja fyri stjórnini. Biðið fyri teimum trúgvandi, at evangeliið verður boðað, og at menniskju koma til trúgv.

## *20. Mánadagur* *Josva 13.15-33*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen**

Tørvurin her um leiðir er stórur. Biðið, at fleiri arbeiðsfólk koma. Vit mugu nú velja annan av tveimum ættarbólkum at arbeiða í. Boð hevur verið eftir Natalie á heilsumiðstøðini hjá NTM, tí har mangla fólk.

**FILIPSOYGGJAR, Manila, Anja Nielsen (f)**

Biðið fyri mær, nú eg vitji samkomur í Føroyum.

## *21. Týsdagur* *Ápost. 10.1-23*



**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 5**

Vit eru takksom, at fleiri hava søkt um at verða við í stutttíðar tænastu komandi ár hjá NTM. Wina hevur tað betri í rygginum; biðið, at hon batnar enn meira.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 8, Noah 7, Karis 3, Judah 1**

⋆ Í dag fyllir Trisha Guttesen 5 ár.

## *22. Mikudagur* *Josva 14.1-15*



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

Okkum tørvar fleiri næmingar til komandi skúlaár. Frá sept. er ætlanin eftir áheitan frá 2. árs næmingum at leingja skúlagongdina við einum ári. Hetta krevur nógva fyrireiking, tí skeiðið skal vera á universitetsstøði. Okkum tørvar eisini fleiri starvsfólk.

**NTM Føroyar**
**Noomi og Eli Christiansen, Hadassa 6, Tabita 3, Debora 1**

Ein næmingur hevur søkt um at fara á bíbliuskúlan hjá NTM í North Cotes College í Onglandi..

## *23. Hósdagur* *Johs.ev. 12.1-24*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Síðst í mars fari eg, Jógvan Júst, í ein mánað ella so at savna meg um at læra italienskt. Eg havi lært nógv síðsta árið, men enn er langt á mál. Mær tørvar at vera meira saman við italienarum.

## *24. Fríggjadagur* *Jóhs.ev. 12.25-50*



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 12, Micah 10, Ezra 8, Uhenya 5, Boas 3**
Regntíð er, og tí herjar malaria. Biðið, at heilsan heldur hjá næmingunum, teimum, vit arbeiða saman við og teirra familjum. Tað er torført hjá fólki her á leið at koma til lækna; tí mugu vit mangan koyra tey í skundi á sjúkrahús.

## *25. Leygardagur* *Jóhs.ev. 13.1-20*

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen, Jens Allan 15, Ryan 7**
Vit byrja bíbliutímar við nýggjum bólki við børnum í skúlaaldri. Marion fer eisini at hava tveir bíbliubólkar, annar fyri eldri og hin fyri yngri kvinnum. Vit hava gjørt framstig at skriva og leggja frálærutilfar til rættis, og at læra fólk at lesa og skriva susu-málið.

## *26. Sunnudagur* *Jóhs.ev. 13.21-38*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit hava nú avgreitt 1. og 2. Timoteusarbræv at senda til ein umsetingarráðgeva. Vit gera tvær týðingar, so at hvørt landaøki kann lesa Guds orð á egnum máli. Eg flúgvi til Skotlands 29. mars. Biðið fyri tryggari ferð.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 12, Victoria, 10, Emma Grace 9,**
**Jónatan 7, Marcus 4, Evita Linda 1**

Eini hjún eru nýliga komin til trúgv. Tey eru ágrýtin at læra meir úr Bíbliuni og fortelja familjuni, hvat hent er í teirra lívi. Biðið, at tey vaksa í kærleika til Frelsaran. Nýliga kom maður til trúgv; biðið, at konan eisini lærir Jesus at kenna sum frelsara.

## *27. Mánadagur* *Jóhs.ev. 19.1-18*




**VENESUELA, Puerto Ayacucho**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Av truplu politisku støðuni eru flestu amerikansku trúboðarar fyribils heima í farloyvi. Tí eru uppgávur okkara vorðnar nógvar og fjølbroyttar. Biðið fyri heilsu okkara, nú samlaði heilivágurin í landinum er minkaður niður í 10%; men vit gleðast, tí verkið ber ávøkst.

## *28. Týsdagur* *Jóhs.ev. 19.19-42*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 13, Rebekka 11, Hanna 8**

Gleðiligt, at familjan vitjaði tvær vikur í febr.; vit høvdu ikki sæð tey í hálvtannað ár; men ringt var at siga farval, serliga hjá gentunum. Tær rinda høgan prís fyri arbeiðið, foreldrini hava valt. Tað krevur nógva tíð at hjálpa sjúklingum, sum noyðast langa leið til býin fyri at koma á sjúkrahús. Samstundis er torført er at vita, nær best er at hjálpa ella heldur at savna seg um at umseta Bíbliuna.

★ Í dag fyllir Joy Johannesen 15 ár
★ og Lydia Jane Niclasen 7 ár.

## *29. Mikudagur* *Esaias 53.1-12*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Nú undirvísir John um Opinberingina. Fólk vísa stóran áhuga. Samkoman er vaksin nógv síðstu mánaðirnar. Biðið fyri okkum og teimun nýggju í samkomuni

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Selma Godtfred, Durita Olsen, Kristianna J. Heinesen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Jónvør Christiansen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 14**
Á skúlanum og á høvuðsstøðini hevur í fleiri ár verið tørvur á langtíðarstarvsfólki innan roknskap, netumsiting og matgerð. Fyristøðufólk til køkin og fólk til netumsiting eru serliga neyðug komandi skúlaár.

## MÍNI BØNAREVNI

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *31.Fríggjadagur* *Johs.ev. 20.19-31*

## OM FØROYAR
### Anita og Oddmar Tausen

OM fyrireikar hesi tiltøk: Teenstreet í summar, TIM toymini til Moldova og Albania í juli, og Transform til Spania. Logos Hope vitjar nú oyggjarnar í karibiska havinum.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók!**

**195 kr.**

Francine Rivers hevur skrivað 52 andaktir, sum viðgera undrini, vit síggja í Guds skapanarverki. Vit verða bergtekin av veldi og valdi Guds, meðan vit lesa, og fáa nýggja sjón og fatan av Gudi í okkara egna lívi. Hann gevur styrki og leiðir okkum gjøgnum truplastu umstøður.




Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo